**Flogbóltssamband Føroya**
Faroes Volleyball Association

ÍSF-húsið
Gundadalur
P.O.Box 1021
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 31 87 66
Mobile +298 21 87 66
Fax +298 31 24 21

e-mail: fbf@fbf.fo
www.fbf.fo

Member of ÍSF, CEV og FIVB

Bank:
EIK: 9181 120.042.0

# UPPSKOT

# TIL

# AÐALFUNDIN

# 2009

ATLANTIC AIRWAYS
stuðul

Eik
høvuðsstuðul

**Uppskot frá FBF til aðalfundin 2009**

**1: Yngri deildir:**
Fyri at seta størri fokus á flogbóltin og at varðveita ungdómin í flogbóltshøpi, verður skotið upp at skipað verður fyri **vikuskiftiskappingum fyri dreingir og gentir 12 og 14**. Talan verður um kappingar umleið 3. hvørt vikuskiftið, runt um í landinum, har ein ábyrgdarpersónur frá einum felag kemur at standa fyri vikuskiftiskappingini.

Ungdómsliðini verða skipaði í bólkar, og nr. 1 – og 2 í hvørjum bólki leika seg víðari í eitt finaluumfar.

Sostatt detta nakrar av kappingunum burtur í sambandi við FM-dagin, sum hevur verið higartil, men liðini fáa ígjøgnum árið nógv fleiri dystir.

Hugsað verður í hesum sambandi um bólkarnar 12, ár, 14, ár – 16 ár hevur longu landskapping.

Tey 10 ára gomlu hava núverandi finaludag – sjá tó uppskot frá Drátti um stiggeving.

Ein bólkur verður settur at arbeiða víðari við endaliga uppskotinum, sum skal koma í gildi til komandi kappingarár.

---

**2: FM finalur fyri yngri deildir.**
Tað skulu vera min. 10 spælarar á hvørjum liði til endaumfar hjá D14, G14 og unglingum (FM á Tvøroyri).

Min. 10 spælarar skulu verða á hvørjum liði og hava eins spælibúnar.

---

**3: G 10 og D 10**
Kappingin fyri D10 og G10 skal skipast sum kidsvolley kapping.

---

**4: 2 leikbúnar meistaradeildin:**
Liðini skulu hava minst tveir leikbúnar - tvs. tveir ymiskar litir, soleiðis at lið, sum spæla ímóti hvørjum øðrum ikki spæla í sama liti.

Heimaliðið ásetur sín 1. lit.

---

**5: Finalur – januarkappingi hjá teimum yngru (Mjølnir-kappingin)**
Finalurnar frá hesi kapping verða leiktar tá steypafinalan hjá teimum eldru er í februar Havn. Hetta fyri at brúka høllina sum mest, tá Taraflex-vøllurin kortini er lagdur út – onkur finala verður leigardagin og onkur sunnudagin.

---

**6: Endaumfar í EIK-ligaini – kvinnur og menn:**
Nr. 1 og 2 í landskappingini leika best av trimum finalum – hetta fyri at seta meira fokus á endan á landskappingini, sum kanska hevur mist eitt sindur av virðinum orsakað av steypakappingini.

**To:** <fbf@fbf.fo>
**Subject:** uppskot til aðalfundin
**CC:**
**Date:** Sat, 11 Apr 2009 16:38:42 GMT
**Status:** Normal
**From:** "Suni Hansen" <rannvao@post.olivant.fo>
**Reply-to:** "Suni Hansen" <rannvao@post.olivant.fo>

3

default.htm

Orsaka av páskafrítíð uttan internet, kemur uppskotið hjá Drátti ikki fyrr enn nú, vónandi kunnu tit taka hetta við allikavæl.

1. Vit mæla til broytingar fyri yngri deildir soleiðis, at kappingarnar gjøgnum árið telja við til FM, so man ikki vinnur FM við bara at vinna eina kapping. Hetta kann gerðast soleiðis:

Tað eru 4 kappingar ið telja við komandi ár TB, Fleyr, Mjølnir og Dráttur. Tann ið vinnur kappingina fær 3 stig, nr. 2 fær 2 stig og nr. 3 fær 1 stig. Fyri at spenningurin kann varveitast fram til FM kappingina, kann vinnarin av FM kappingini fáa 5 stig, nr. 2 fáa 3 stig og nr. 3 fáa 1 stig.

2. Uppskotið hjá Drátti frá seinasta aðalfundi um steypakappingina skuldi fara í eina nevnd, ið skuldi endurskoða kappingina. Vit vilja við hesum minna á hetta og taka hetta við á hesum komandi fundi.

Vegna flogboltsfelagið Dráttur

Rannvá Ólavsdóttir

**To:** fbf@fbf.fo
**Subject:** uppskot til aðalfund
**CC:**
**Date:** Fri, 10 Apr 2009 23:24:15 GMT
**Status:** Normal
**From:** "Helen á Lakjuni" <hl2109m4@skulin.fo>
**Reply-to:** "Helen á Lakjuni" <hl2109m4@skulin.fo>

4

default.htm
Mál til aðalfundin 19. apríl

Ynskiligt hevði verið, at tey feløg, sum hava bæði manslið og kvinnulið í eik-liguni, kundu spælt heimadystirnar sama dag.
Ikki sum tað hevur verið síðstu árini, at t.d. ÍF KV spæla á Kambsdali sama dag, sum ÍF M spæla í Sørvági.

Tað hevði bøtt um áskoðaratalið og hevði verið stuttligar fyri okkum spælarar at síggja dystirnar hjá hvørjum øðrum.

Enn betri hevði verið um fleiri lið t. d. G 14/16, D14/16 kvinnuungl. ella mansungl. eisini spældu sama dag áðrenn Eik-lika liðini.

Vinarliga

ÍF-flogbóltur

# Leikskrá hjá meistaradeild hjá kvinnum

**grein 1**

**a)** Í meistaradeild hjá kvinnum verður leikt hálvt annað umfar, t.v.s. ein heimadyst og ein útidyst móti hvørjum liði, og ein heimadyst móti helvtina av liðinum og ein útidyst móti helvtina av liðinum. Eftir fyrsta umfarið verða tey stig, ið liðini hava fingið býtt í helvt.

**b)** Lið í luttaka í meistaradeild hjá kvinnum verða raðfest eftir úrslitið undafarna kappingarár. Raðfesting avgerð hvat lið spælur heima og hvat lið spælur úti ímóti hvør øðrum í tí hálva umfarinum.

**grein 2**

**a)** Lið í er raðfest nr. 1 hevur heimadyst móti liðum ið eru raðfest nr. 2, nr. 5 og nr. 6. Lið í er raðfest nr. 1 hevur útidyst móti liðum ið eru raðfest nr. 3, nr. 4 og nr. 7.

**b)** Lið í er raðfest nr. 2 hevur heimadyst móti liðum ið eru raðfest nr. 3, nr. 5 og nr. 6. Lið í er raðfest nr. 2 hevur útidyst móti liðum ið eru raðfest nr. 1, nr. 4 og nr. 7.

**d)** Lið í er raðfest nr. 3 hevur heimadyst móti liðum ið eru raðfest nr. 4, nr. 5 og nr. 6. Lið í er raðfest nr. 3 hevur útidyst móti liðum ið eru raðfest nr. 1, nr. 2 og nr. 7.

**e)** Lið í er raðfest nr. 4 hevur heimadyst móti liðum ið eru raðfest nr. 1, nr. 2 og nr. 7. Lið í er raðfest nr. 4 hevur útidyst móti liðum ið eru raðfest nr. 3, nr. 5 og nr. 6.

**f)** Lið í er raðfest nr. 5 hevur heimadyst móti liðum ið eru raðfest nr. 1, nr. 4 og nr. 6. Lið í er raðfest nr. 5 hevur útidyst móti liðum ið eru raðfest nr. 2, nr. 3 og nr. 7.

**g)** Lið í er raðfest nr. 6 hevur heimadyst móti liðum ið eru raðfest nr. 1, nr. 4 og nr. 7. Lið í er raðfest nr. 6 hevur útidyst móti liðum ið eru raðfest nr. 2, nr. 3 og nr. 5.

**h)** Lið í er raðfest nr. 7 hevur heimadyst móti liðum ið eru raðfest nr. 2, nr. 3 og nr. 5. Lið í er raðfest nr. 7 hevur útidyst móti liðum ið eru raðfest nr. 1, nr. 4 og nr. 6.

# Kappingarreglur fyri steypakapping hjá børnum og ungum

**grein 1**

**a)** Leikt verður í steypakappingini eftir teimum leikreglum hjá I.V.B.F., sum eina og hvørja tíð eru galdandi fyri flogbólt.

**grein 2**

**a)** Kappingarárið er frá 1. juli til 30. juni.

**b)** Fyri hvørt lið gjalda feløgini fyrireikaranum av tí steypakapping tey luttaka ið luttøkugjald, sum verður ásett av aðalfundinum.

**d)** Luttøkugjaldið skal verða fyrireikaranum í hendi 10 dagar, áðrenn kappingin byrjar.

**e)** Felag sleppur ikki at luttaka í steypakapping fyrr enn luttøkupeningurin er goldin.

**f)** Feløgini, ið skipa fyri kappingunum, eiga at fáa tilmeldingar í so góðari tíð, at boð um tíðir o.a. kunnu sendast luttakandi feløgunum eina viku undan hvørjari kapping.

**g)** Ongin landskappingardystur skal leggjast sama dag sum ein steypakapping er.

**grein 3**

**a)** Eingin dystur skal verða leiktur undir almennari gudstænastu og skal helst ikki byrja fyrr enn 1 tíma aftaná, at gudstænastan er lokin.

**grein 4**

**a)** Steypakappingar eru til teir aldursbólkar ið ikki spæla landskapping.

**b)** Hendan reglugerð er galdandi fyri steypakappingar í niðanfyri nevndu aldursbólkum. Onnur reglugerð er fyri landskappingar.

**grein 5**

**a)** Hesir aldursbólkar kunnu hava steypakapping í flogbólti.

Kvinnuunglingar og mansunglingar, sum ikki skulu vera fylt 19 ár 1. januar í kappingarárinum.

Gentur/dreingir 16, sum ikki skulu vera fylt 17 ár 1. januar í kappingarárinum. Tó kunnu allar/allir gentir/dreingir í 10. flokki luttaka.

Gentur/dreingir 14, sum ikki skulu vera fylt 15 ár 1. januar í kappingarárinum. Tó kunnu allar/allir gentir/dreingir í 8. flokki luttaka.

Gentur/dreingir 12, sum ikki skulu vera fylt 13 ár 1. januar í kappingarárinum. Tó kunnu allar/allir gentir/dreingir í 6. flokki luttaka.

Gentur/dreingir 10, sum ikki skulu vera fylt 11 ár 1. januar í kappingarárinum. Tó kunnu allar/allir gentur/dreingir í 4. flokki luttaka.

**b)** Mælt verður til, at steypakappingarnar fyri gentur/dreingir 10 verða skipaðar fyri seg og ikki saman við steypakappingum fyri hini yngri aldursbólkarnar.

**d)** Steypakappingar hjá gentur/dreingir 10 kunnu fyriskipast uttan at sama felag skipar fyri steypakapping fyri hinum aldursbólkunum.

**e)** Hæddin á netininum

Gentur 10 1,95 m

Dreingir 10 1,95 m

Gentur 12 2,10 m

Dreingir 12 2,10 m

Gentur 14 2,14 m

Dreingir 14 2,24 m

Gentur 16 2,20 m

Dreingir 16 2,35 m

Kvinnuunglingar 2,24 m

Mansunglingar 2,43 m

**grein 6 Føroyameistara kapping**

**a)** Føroyameistara kapping verður skipa sum steypakapping í teimun aldursbólkum sum ikki spæla landskapping.

**b)** Øll lið kunnu luttaka í Føroyameistara kappingini uttan mum til úrslit frá øðrum kappingum. Tó skal lið hava luttikið í tveimum steypakappingum í kappingarárinum.

**d)** Ongin landskappingardystur skal leggjast sama vikuskifti sum Føroyameistara kapping er.

**e)** FBF kann skipa fyri at finalur í Føroyameistara kapping verða ein annan dag enn restina av kappingini.

**f)** Tað er onki luttøkugjald til Føroyameistara kappingina.

**g)** Meistaraheitini verða nevnd soleiðis:

Vinnari í Unglingadeildini Føroyameistari

Vinnari í gentur/dreingir 16 Føroyameistari

Vinnari í gentur/dreingir 14 Føroyameistari

Vinnari í gentur/dreingir 12 Føroyameistari

Vinnari í gentur/dreingir 10 Føroyameistari

**grein 7 Fyrireikari**

**a)** Feløgini, ið skipa fyri steypakappingum, eiga at hava í huga, at tað fyrst og fremst snýr seg um spælararnar - at tað er stuttligt at spæla og kappast.

**b)** Børn 12 ár og yngri, skulu læra flogbólt á ein stuttligan og mennandi hátt. Kappingar skulu vera ein góð uppliving, og øll skulu fáa mest møguligt burturúr.

**d)** Bólkarnir eiga at vera so stórir, at øll lið fáa minst tríggjar dystir, um hetta er gjørligt. Tó er tað ein treyt, at minst tvey lið í hvørjum bólki koma víðari.

**e)** Tað skal spælast um fyrsta, annað og triða pláss í steypakappingum. Øll lið skulu hava sama møguleika at gerast millum trý tey fremast liðini um gjørligt.

**f)** Fyrireikandi felag skal seta fastar dómarar til gentur/dreingir 10 og gentur/dreingir 12. Dómararnir skulu duga reglurnar væl.

**g)** Reglurnar skulu heingjast upp við allar vøllir.

**h)** Beint áðrenn steypakappingin hjá gentur/dreingir 10 og gentur/dreingir 12 byrjar, traðka leiðararnir fyri liðini saman. Hetta fyri at tryggja at øll duga reglurnar og annars semjast um, hvussu farast skal fram, og um neyðugt gera broytingar.

**i)** Góður ítróttaandi skal fremjast, leiðararnir skulu ganga undan.

**grein 8**

**a)** Gentur/dreingir 12 og gentur/dreingir 10 spæla á badmintonvøllinum.

**b)** Gentur/dreingir 12 og gentur/dreingir 10 spæla við teimum best egnaðu barnaflogbóltinum. Vaksnamannabóltur skal ikki nýtast.

**d)** Hjá gentur/dreingir 12 og gentur/dreingir 10 skal dupultslag ikki dømast. Bara grovar føringar skulu dømast. Yvirtrak á miðlinju og net skal dømast.

**e)** Hjá gentur/dreingir 12 og gentur/dreingir 10 er tað ikki loyvt at sparka bóltin.

**grein 9**

**a)** Í Kvinnuunglingar og mansunglingar, gentur/dreingir 16 og gentur/dreingir 14 eru í minsta lagi 6 leikara á hvørjum liði og í mesta lagi 12 leikarar tilsamans.

**b)** Í gentur/dreingir 12 eru í minsta lagi 5 leikara á hvørjum liði og í mesta lagi 9 leikarar tilsamans. Gentur kunnu spæla á dreingjaliði. 4 leikara eru inni á vøllinum í senn, flótandi útskifting eftir hvørja rotatión. Um lið hevur 8 ella 9 leikara, so er loyvt bert at brúka 5 leikara í einum setti, treyta av at teir leikara sum ikki spæla hetta setti skulu spæla næsta sett saman við leikaraum í spældi fyrra setti soleiðis at akkurát 5 leikara spæla í hvørjum setti í dystinum.

**d)** Í gentur/dreingir 10 eru í minsta lagi 3 leikara á hvørjum liði og í mesta lagi 7 leikarar tilsamans. Kunnu vera blandað lið. 3 ella 4 leikara eru inni á vøllinum í senn.

**grein 10 Serv**

**a)** Gentur/dreingir 14: Loyvt verður at serva yvirhondsserv frá baklinjuni og undirhondsserv 3 metur inni á vøllinum.

**b)** Gentur/dreingir 12: Skal verða undirhondserv. Servuøki: Aftan fyri 3 metur linjuna (badmintonvøllurin). Endamálið er at seta spælið í gongd.

**d)** Gentur/dreingir 10: Skal verða undirhondserv. Servuøki: Aftan fyri 3 metur linjuna (badmintonvøllurin). Endamálið er at seta spælið í gongd.

**grein 11**

**a)** Í gentur/dreingir 12 verður rotera eftir at sami leikarin hevur servað 3. servur á rað.

**b)** Í gentur/dreingir 10 skiftir servurætturin til hitt í liði eftir at sami spælari hevur servað 3 bóltar á rað, tó verður einki stig givið.

**grein 12**

**a)** Luttekur felag við meira enn einum liði í sama aldursbólki, skulu liðini nevnast í bókstavarað ella talrað soleiðis, at A ella 1 verður at rokna sum tað besta liðið, B ella 2 sum tað næstbesta o.s.fr.

**b)** *Niðurflyting:* Ein spælari kann flyta frá hægra liðnum til lægra lið í steypakappingini.

**d)** *Uppflyting:* Ein spælari kann flyta frá lægra liðnum til hægra lið í steypakappingini.

**grein 13**

**a)** Vunnin dystur gevur 2 stig. Tapandi liðið fær 0 stig.

**b)** Møtir lið ikki til dyst, fær tað null stig.

**d)** Tað liðið, sum við lokna kapping hevur flest stig, er vinnari.

**e)** Um javnt er í stigum, er hægstljóðandi settmunur avgerandi. Stendur eisini her á jøvnum, eru innanhýsis dystir avgerandi – íroknað bóltmun. Stendur enn á jøvnum, verður umdystur leiktur.

**grein 14**

**a)** Leikarar á einum liði skulu vera í eins leikbúna.

**b)** Um búnin hevur lýsing, skal hon lúka tær treytir, FBF hevur ásett.

**grein 15**

**a)** Ber leikari seg so ósømiliga at á vølli, at dómarin má reka hann úr leiki, skal dómarin skrivliga siga kappingarstjóra FBFs frá.

**b)** Kappingarstjórinin kann nokta slíkum leikara at luttaka í kapping ásetta tíð.

**d)** Nýtir dómari rætt sín at slíta dystin, skal hann beint aftaná dystin skrivliga greiða kappingarstjóra FBFs frá, hví hann so gjørdi.

**grein 16**

**a)** Heldur liðformaður ella venjari, at dómari misnýtir vald sítt, skal hann sámuliga mótmæla tí á leikvøllinum. Góðtekur dómarin ikki mótmæli hansara, kann liðformaðurin ella venjari ella felag hansara senda skrivliga kæru til kappingarstjóra FBFs í seinasta lagi 2 dagar aftan á dystin. Fylgja skulu kr. 500,- við slíkari kæru, sum verða afturgoldnar, um kæran vinnur sømdir, hetta er eisini galdandi fyri allar aðrar klagur.

**grein 17**

**a)** Kærur um avgerðir kappingarstjórans verða at leggja fyri dómsnevndina. Við kæruni skulu fylgja 1.000,- kr., sum verða afturgoldnar, um kæran vinnur sømdir.

**b)** Allar avgerðir dómsnevndarinnar eru endaligar.

**grein 18**

**a)** Hesar reglur kunnu bert verða broyttar á aðalfundi ella eykaaðalfundi hjá FBF.

# Kappingarreglur fyri landskapping hjá ungum

**grein 1**

**a)** Leikt verður í landskappingini eftir teimum leikreglum hjá I.V.B.F., sum eina og hvørja tíð eru galdandi fyri flogbólt.

**grein 2**

**a)** Kappingarárið er frá 1. juli til 30. juni.

**b)** Fyri hvørt lið gjalda feløgini FBF luttøkugjald, sum verður ásett av starvsnevndini.

**d)** Luttøkugjaldið skal verða FBF í hendi 14 dagar, áðrenn kappingin byrjar.

**e)** Felag sleppur ikki at luttaka í kappingum FBFs, fyrr enn luttøkupeningurin er goldin.

**grein 3**

**a)** Eingin landskappingardystur skal verða leiktur undir almennari gudstænastu og skal helst ikki byrja fyrr enn 1 tíma aftaná, at gudstænastan er lokin.

**grein 4**

**a)** FBF ger av hvørjir aldursbólkar spæla landskapping og hvørjir aldursbólkar spæla steypakapping.

**b)** Hendan reglugerð er galdandi fyri landskappingar í niðanfyri nevndu aldursbólkum. Onnur reglugerð er fyri steypakappingar.

**grein 5**

**a)** Hesir aldursbólkar kunnu hava landskapping í flogbólti.

Kvinnuunglingar og mansunglingar, sum ikki skulu vera fylt 19 ár 1. januar í kappingarárinum.

Gentur/dreingir 16, sum ikki skulu vera fylt 17 ár 1. januar í kappingarárinum. Tó kunnu allar/allir gentir/dreingir í 10. flokki luttaka.

Gentur/dreingir 14, sum ikki skulu vera fylt 15 ár 1. januar í kappingarárinum. Tó kunnu allar/allir gentir/dreingir í 8. flokki luttaka.

**b)** Meistaraheitini verða nevnd soleiðis:

Vinnari í Unglingadeildini Føroyameistari

Vinnari í gentur/dreingir 16 Føroyameistari

Vinnari í gentur/dreingir 14 Føroyameistari

**d)** Hæddin á netininum

Gentur 14 2,14 m

Dreingir 14 2,24 m

Gentur 16 2,20 m

Dreingir 16 2,35 m

Kvinnuunglingar 2,24 m

Mansunglingar 2,43 m

**grein 6**

**a)** Gentur/dreingir 14: Loyvt verður at serva yvirhondsserv frá baklinjuni og undirhondsserv 3 metur inni á vøllinum.

**grein 7**

**a)** Tá feløgini hava sagt frá luttøku, ger kappingarnevnd FBF's av, um kappingin verður einkult ella dupult, og um liðini verða skipað sundur í bólkar.

**b)** Um liðini verða skipa sundur í bólkar, fer í minsta lagi nr. 1 og nr. 2 í hvørjum bólki víðari til eitt finaluumfar eftir fyriskipan FBF's.

**d)** Kappingin skal leggjast soleiðis tilrættis at allir leikarnir eisini kunnu spæla við besta liðum hjá sama felag í vaksnu deildunum.

**e)** Heimaliðið tekur við øllum útreiðslum og inntøkum viðvíkjandi umfarsdystum.

**f)** Dómarafelagið skal gjalda útreiðslurnar hjá dómaranum.

**grein 8**

**a)** Luttekur felag við meira enn einum liði í sama aldursbólki, skulu liðini nevnast í bókstavarað ella talrað soleiðis, at A ella 1 verður at rokna sum tað besta liðið, B ella 2 sum tað næstbesta o.s.fr.

**b)** *Niðurflyting:* Spælari skal leypa dyst um á hægra liðnum, áðrenn niðurflyting. Hægra liðið verður altíð roknað at leika fyrst.

**d)** *Uppflyting:* Spælari kann leika á hægri liði næsta leikumfar.

**e)** Eitt leikumfar gongur frá og við mánadegi og til og við sunnudag.

**f)** Eitt lið kan leika fleiri dystir sama leikumfar.

**g)** Bert kappingarstjóri FBFs kann geva loyvi til at flyta ein dyst.

**h)** Fluttir dystir verða roknaðir sum leiktir tann upprunaliga ásetta dagin, eisini í sambandi við upp- og niðurflyting av spælarum.

**i)** Niðurflyting frá hægri til lægri lið er ikki loyvd leikara tann seinasta triðingin av kappingini.

**grein 9**

**a)** Nýtir felag í landskappingini leikara, sum kappingarstjórin ikki hevur fingið boð um (navn, aldur og bústað) í minsta lagi dagin fyri dystin, tapir felagið dystin.

**grein 10**

**a)** Luttakandi leikari skal í minsta lagi hava verið limur ein mánað í tí felag, sum hann luttekur fyri.

**b)** Felag kann nokta leikara at flyta til annað felag, um so er, at felagið metir, at peningalig ella onnur felagslig áhugamál binda viðkomandi leikara.

**grein 11**

**a)** Um leikari sigur seg úr felag, ið hann hevur leikt landskappingardyst fyri við byrjan kappingarársins, og gerst limur í øðrum felag, sum eisini tekur lut í landskappingini, hevur hann loyvi at leika fyri hetta felag aftan á leikbann í 1 mánað, tó ikki seinasta triðingin av kappingini, galdandi fyri bæði feløgini. Tað er bert loyvt at skifta eina ferð mitt í kappingarárinum.

**b)** Leikari, ið skiftir felag mitt í kapingarárinum, skal boða kappingarnevndini frá flytingini 30 dagar áðrenn fyrsta landskappingardyst, hann ætlar at leika fyri nýggja felagið.

**d)** Leikarar, ið spæla í kapping uttanlands, hava loyvi at leika fyri føroyskt felag eftir leikbann í ein mánað eftir seinasta landskappingar/steypadyst uttanlands.

**grein 12**

**a)** Dómaraseðilin skal handast dómaranum, áðrenn leikur byrjar. Á dómaraseðlinum skulu standa allir leikarar og útskiftingarleikarar, tó í mesta lagi 12 leikarar tilsamans, og somuleiðis útskiftingarleiðarin. Allir leikararnir verða roknaðir fyri at hava spælt dystin.

**b)** Áðrenn leikbyrjan skulu liðleiðari og útskiftingarleiðari undirskriva dómaraseðilin.

**d)** Eftir leikbyrjan er ikki loyvt at seta leikara á dómaraseðilin.

**e)** Eru klagur, skulu tær verða tilskilaðar á dómaraseðlinum.

**grein 13**

**a)** Vunnin dystur gevur 2 stig. Tapandi liðið fær 0 stig.

**b)** Møtir lið ikki til dyst, fær tað null stig.

**d)** Somuleiðis verður givið null stig til tey lið, sum sínamillum avtala at útseta dyst, uttan at hava fingið loyvi til tess frá kappingarstjóranum.

**e)** Tá ið dystur verður fluttur í samráð við kappingarstjóran, skal nýggjur dystur verða ásettur í mesta lagi eina viku frá ásetta leikdegnum. Starvsnevndin í FBF kann gera undantøk frá hesi reglu.

**f)** Tað liðið, sum við lokna kapping hevur flest stig, er vinnari av deildini.

**g)** Um javnt er í stigum, er hægstljóðandi settmunur avgerandi. Stendur eisini her á jøvnum, eru innanhýsis dystir bæði í innleiðandi umfarinum og í deildini avgerandi – íroknað bóltmun. Stendur enn á jøvnum, verður umdystur leiktur. Kappingarstjóri FBFs ástur tíð og stað fyri hendan dyst.

**grein 14**

**a)** Í minsta lagi 14 dagar áðrenn kappingin byrjar, skulu øll luttakandi feløg til FBF geva upp navn, føðingardagar og -ár á øllum leikarum.

**b)** Er føðingardagur og -ár ikki uppgivið, hevur leikari ikki loyvi at luttaka.

**grein 15**

**a)** Sigur lið seg skrivliga til FBF úr kappingini, og FBF góðtekur hetta, verða teir dystir, ið hetta lið hevur leikt, ikki roknaðir við í kappingini.

**b)** Sekt við ikki leiktum dystum!

Møtir lið ikki til dyst, avgerð starvsnevndin, um liðið skal vera koyrt úr kappingini, ella onnur sekt skal verða givin. Avgerðin hjá starvsnevndini kann verða kærd til dómsnevndina áðrenn 2 dagar. Við kæruni skulu fylgja kr. 2.000, sum verða afturgoldnar, vinnur kæran sømdir. Dómsnevndin hevur endaliga avgerð.

Um lið ikki møtir til útidyst í fyrru helvt av kappingini, missir tað sín heimadyst móti sama liði í seinnu helvt av kappingini. Møtir lið ikki til dyst í seinnu helvt, verða báðir dystir roknaðir sum taptir og sum ikki møtt til *báðar* dystir.

**d)** Noktar lið uttan gilduga orsøk at luttaka, verður tað koyrt úr kappingini. Sama hendir um lið rýmir av vølli.

**e)** Lið sum verða koyrd úr kappingini, verða sektað við bót, ið svarar til 2 ferðir luttøkugjaldið fyri liðið. Er sekt ikki goldin innan næsta kappingarár, sleppur felag ikki at luttaka í kapping innan FBF, fyrr enn hon er goldin.

**f)** Um lið ikki møtir til dyst til ásettu tíð, verður felagið sektað við bót, svarandi til luttøkugjaldið og tapir dystin 3-0.

**grein 16**

**a)** Tað liðið, sum leikar á heimavølli, skal leggja bólt, sum er góðkendur av FBF, og minst 10 tiltaksbóltar til.

**b)** Heimaliðið hevur ábyrgdina av, at vøllurin er lógliga merktur, at netið er í lagi og kann setast í røttu hædd.

**d)** Dómarin skal vissa sær, at vallarviðurskiftini eru í lagi, áðrenn leikur byrjar.

**e)** Leikvøllurin skal vera góðkendur av FBF.

**grein 17**

**a)** Leikarar á einum liði skulu vera í eins leikbúna.

**b)** Hvør leikbúni skal hava nummar á rygginum, minst 15 cm til hæddar. Hvør leikbúni skal hava nummar á bringuni, minst 10 cm til hæddar.

**d)** Um búnin hevur lýsing, skal hon lúka tær treytir, FBF hevur ásett.

**grein 18**

**a)** Ger felag brot á grein 8, 9, 10, 11, 12, 13, 14 ella 15, kann tað fáa bót og/ella tapa dystin soleiðis, at hitt liðið fær tvey stig fyri dystin, og vinnur hann 3-0 í settmuni og 75-0 í bóltmuni, tó í teimum førum har spælt verður best av 3 settum, verður tað 2-0 í settmuni og 50-0 í bóltmuni.

**grein 19**

**a)** Ber leikari seg so ósømiliga at á vølli, at dómarin má reka hann úr leiki, skal dómarin skrivliga siga kappingarstjóra FBFs frá og somuleiðis viðmerkja hetta á dómaraseðlinum.

**b)** Kappingarstjórinin kann nokta slíkum leikara at luttaka í kapping ásetta tíð.

**d)** Nýtir dómari rætt sín at slíta dystin, skal hann beint aftaná dystin skrivliga greiða kappingarstjóra FBFs frá, hví hann so gjørdi.

**grein 20**

**a)** Heldur liðformaður, at dómari misnýtir vald sítt, skal hann sámuliga mótmæla tí á leikvøllinum. Góðtekur dómarin ikki mótmæli hansara, kann liðformaðurin ella felag hansara senda skrivliga kæru til kappingarstjóra FBFs í seinasta lagi 2 dagar aftan á dystin. Somuleiðis skal hetta viðmerkjast á dómaraseðlinum. Fylgja skulu kr. 500,- við slíkari kæru, sum verða afturgoldnar, um kæran vinnur sømdir, hetta er eisini galdandi fyri allar aðrar klagur.

**grein 21**

**a)** Kærur um avgerðir kappingarstjórans verða at leggja fyri dómsnevndina. Við kæruni skulu fylgja 1.000,- kr., sum verða afturgoldnar, um kæran vinnur sømdir.

**b)** Allar avgerðir dómsnevndarinnar eru endaligar.

**grein 22**

**a)** Frá tí degi, ið felag hevur sagt frá, at tað luttekur í landskappingini, er tað bundið til at luttaka eftir lógum og reglugerðum FBFs.

**b)** Tó kann kappingarstjóri FBFs eftir áheitan felagsins góðtaka tær orsøkir, ið felagið førir fram, at tað ikki heldur fram við kappingini. Ein slík áheitan má vera nevndini í hendi í minsta lagi 5 dagar, áðrenn dystur felagsins skal fremjast.

**grein 23**

**a)** Hesar reglur kunnu bert verða broyttar á aðalfundi ella eykaaðalfundi hjá FBF.

# Kappingarreglur fyri vaksin

**grein 1**

**a)** Leikt verður í landskappingini eftir teimum leikreglum hjá I.V.B.F., sum eina og hvørja tíð eru galdandi fyri flogbólt.

**grein 2**

**a)** Kappingarárið er frá 1. juli til 30. juni.

**b)** Fyri hvørt lið gjalda feløgini FBF luttøkugjald, sum verður ásett av starvsnevndini.

**d)** Luttøkugjaldið skal verða FBF í hendi 14 dagar, áðrenn kappingin byrjar.

**e)** Felag sleppur ikki at luttaka í kappingum FBFs, fyrr enn luttøkupeningurin er goldin.

**grein 3**

**a)** Eingin landskappingardystur skal verða leiktur undir almennari gudstænastu og skal helst ikki byrja fyrr enn 1 tíma aftaná, at gudstænastan er lokin.

**grein 4**

Landskappingin í flogbólti verður skipað soleiðis eftir dugnaskapi.

1) Meistaradeild kvinnur við 7 liðum og menn við 6 liðum.

a) Í meistaradeild hjá monnum verður leikt dupultumfar, t.v.s. tveir heimadystir og tveir útidystir móti hvørjum liði. Eftir fyrsta umfarið verða tey stig, ið liðini hava fingið býtt í helvt.

b) Í meistaradeild hjá kvinnum verður leikt hálvt annað umfar, t.v.s. ein heimadyst og ein útidyst móti hvørjum liði, og ein heimadyst móti helvtina av liðinum og ein útidyst móti helvtina av liðinum. Eftir fyrsta umfarið verða tey stig, ið liðini hava fingið býtt í helvt. Sí grein um leikskrá hjá meistaradeild hjá kvinnum.

1. deild kvinnur og 1. deild menn við hvør 8 liðum.

2. deild kvinnur og 2. deild menn við óavmarkaðum tali av liðum.

2) Í meistaradeildini kann sama felag bara hava eitt lið.

**d)** Meistaraheitini verða nevnd soleiðis:

Vinnari í Meistaradeildini Føroyameistari

Vinnari í 1. deild Vinnari í 1. deild

Vinnari í 2. deild Vinnari í 2. deild

**grein 5**

**a)** Tá feløgini hava sagt frá luttøku, ger kappingarnevnd FBF's av, um kappingin verður einkult ella dupult, og hvussu liðini í 2. deild verða skipað sundur í bólkar.

**b)** Heimaliðið tekur við øllum útreiðslum og inntøkum viðvíkjandi umfarsdystum.

**d)** Dómarafelagið skal gjalda útreiðslurnar hjá dómaranum.

**e)** Um 2. deild er býtt í bólkar, fer í minsta lagi nr. 1 og nr. 2 í hvørjum bólki víðari til eitt finaluumfar eftir fyriskipan FBF's.

**grein 6**

**a)***Reglur fyri upp- og niðurflyting*

*Niðurflyting:* Spælari skal leypa dyst um á hægra liðnum, áðrenn niðurflyting. Hægra liðið verður altíð roknað at leika fyrst. Undantikið eru tó leikarar, sum ikki eru fyltir 19 ár 1. januar í kappingarárinum. Hesir kunnu leika á lægri liði sama dag, sum hesir hava staðið á dómaraseðli til hægri lið, bert teir ikki hava leikt. Tað, at leikari ikki hevur leikt dyst á hægri liðið, skal greitt framganga undir viðmerkingum til dómaraseðilin hjá hægra liðnum.

*Uppflyting:* Spælari kann leika á hægri liði næsta leikumfar.

**b)** Eitt leikumfar gongur frá og við mánadegi og til og við sunnudag.

**d)** Eitt lið kan leika fleiri dystir sama leikumfar.

**e)** Luttekur felag við meira enn einum liði í somu deild, skulu liðini nevnast í bókstavarað ella talrað soleiðis, at A ella 1 verður at rokna sum tað besta liðið, B ella 2 sum tað næstbesta o.s.fr.

**f)** Bert kappingarstjóri FBFs kann geva loyvi til at flyta ein dyst.

**g)** Fluttir dystir verða roknaðir sum leiktir tann upprunaliga ásetta dagin, eisini í sambandi við upp- og niðurflyting av spælarum.

**h)** Niðurflyting frá hægri til lægri lið er ikki loyvd leikara tann seinasta triðingin av kappingini. Hetta er eisini galdandi fyri leikara sum ikki eru fyltir 19 ár 1. januar í kappingarárinum.

**grein 7**

**a)** Nýtir felag í landskappingini leikara, sum kappingarstjórin ikki hevur fingið boð um (navn, aldur og bústað) í minsta lagi dagin fyri dystin, tapir felagið dystin.

**grein 8**

**a)** Luttakandi leikari skal í minsta lagi hava verið limur ein mánað í tí felag, sum hann luttekur fyri.

**b)** Luttakandi lið hava í mesta lagi loyvi at hava ein útlending á liðnum. Á føroyskum landsliðum kunnu bert føroyingar luttaka. Sum føroyingur verður eisini roknaður útlendingur, ið hevur verið fast búsitandi í Føroyum í minsta lagi 2 ár, og hevur sítt virki her og føroyskan ríkisborgararætt.

**d)** Felag kann nokta leikara at flyta til annað felag, um so er, at felagið metir, at peningalig ella onnur felagslig áhugamál binda viðkomandi leikara.

**grein 9**

**a)** Um leikari – útlendingur ella føroyingur – sigur seg úr felag, ið hann hevur leikt landskappingardyst fyri við byrjan kappingarársins, og gerst limur í øðrum felag, sum eisini tekur lut í landskappingini, hevur hann loyvi at leika fyri hetta felag aftan á leikbann í 1 mánað, tó ikki seinasta triðingin av kappingini, galdandi fyri bæði feløgini. Tað er bert loyvt at skifta eina ferð mitt í kappingarárinum.

**b)** Leikari, ið skiftir felag mitt í kapingarárinum, skal boða kappingarnevndini frá flytingini 30 dagar áðrenn fyrsta landskappingardyst, hann ætlar at leika fyri nýggja felagið.

**d)** Leikarar, ið spæla í kapping uttanlands, hava loyvi at leika fyri føroyskt felag eftir leikbann í ein mánað eftir seinasta landskappingar/steypadyst uttanlands.

**grein 10**

**a)**Dómaraseðilin skal handast dómaranum, áðrenn leikur byrjar. Á dómaraseðlinum skulu standa allir leikarar og útskiftingarleikarar, tó í mesta lagi 12 leikarar tilsamans, og somuleiðis útskiftingarleiðarin. Allir leikararnir verða roknaðir fyri at hava spælt dystin. *Samber tó við grein 6a.*

**b)** Áðrenn leikbyrjan skulu liðleiðari og útskiftingarleiðari undirskriva dómaraseðilin.

**d)** Eftir leikbyrjan er ikki loyvt at seta leikara á dómaraseðilin.

**e)** Eru klagur, skulu tær verða tilskilaðar á dómaraseðlinum.

**grein 11**

**a)** Vunnin dystur gevur 2 stig. Tapandi liðið fær 0 stig.

**b)** Møtir lið ikki til dyst, fær tað null stig.

**d)** Somuleiðis verður givið null stig til tey lið, sum sínamillum avtala at útseta dyst, uttan at hava fingið loyvi til tess frá kappingarstjóranum. Fyri meistaradeildirnar er galdandi: Fyrstu ferð hetta kemur fyri, fær liðið bót og 0 stig, aðru ferð fer liðið úr kapping. Bótin er 2 ferðir luttøkugjaldið.

**e)** Tá ið dystur verður fluttur í samráð við kappingarstjóran, skal nýggjur dystur verða ásettur í mesta lagi eina viku frá ásetta leikdegnum. Starvsnevndin í FBF kann gera undantøk frá hesi reglu.

**f)** Tað liðið, sum við lokna kapping hevur flest stig, er vinnari av deildini.

**g)** Um javnt er í stigum, er hægstljóðandi settmunur avgerandi. Stendur eisini her á jøvnum, eru innanhýsis dystir bæði í innleiðandi umfarinum og í deildini avgerandi – íroknað bóltmun. Stendur enn á jøvnum, verður umdystur leiktur. Kappingarstjóri FBFs ástur tið og stað fyri hendan dyst.

**h)** Nr. 7 í meistaradeildini hjá kvinnum leikar ímóti nr. 1 í 1. deild. Nr. 6 í meistaradeildini hjá monnum leikar ímóti nr. 1 í 1. deild. Leikt verður best av trimum dystum. Liðini hava hvør sín heimadyst. Er neyðugt við avgerandi 3. dysti, verður hann leiktur á øðrum leikvølli.

Nr. 8 í 1. deild flytir í 2. deild komandi kappingarár.

Nr. 7 í 1. deild skal leika ein dyst ímóti nr. 2 í 2. deild. Vinnandi liðið flytir upp í 1. deild næsta kappingarár.

Nr. 1 í 2. deild flytir upp í 1. deild næsta kappingarár.

Nr. 2 í 2. deild skal leika ein dyst ímóti nr. 7 í 1. deild. Vinnandi liðið flytir upp í 1. deild næsta kappingarár.

FBF ásetir leikdagarnar fyri dystirnar.

**i)** Um so er, at nr. 1 og/ella nr. 2 ikki hava rætt at flyta upp, skal skipast fyri kvalifikatiónsdystum millum fylgjandi lið og niðurflytarar (bert niður til nr. 4).

**grein 12**

**a)** Í minsta lagi 14 dagar áðrenn kappingin byrjar, skulu øll luttakandi feløg til FBF geva upp navn, føðingardagar og -ár á øllum leikarum.

**b)** Er føðingardagur og -ár ikki uppgivið, hevur leikari ikki loyvi at luttaka.

**grein 13**

**a)** Heimafelagið skal seta seg í samband við dómaran í seinasta lagi ein dag áðrenn dystin.

**grein 14**

**a)** Sigur lið seg skrivliga til FBF úr kappingini, og FBF góðtekur hetta, verða teir dystir, ið hetta lið hevur leikt, ikki roknaðir við í kappingini.

**b)** Sekt við ikki leiktum dystum!

1. og 2. deild: Møtir lið ikki til dyst, avgerð starvsnevndin, um liðið skal vera koyrt úr kappingini, ella onnur sekt skal verða givin.

Meistaradeild: Møtir lið ikki til dyst, avgerð starvsnevndin, um liðið skal vera koyrt úr kappingini, ella onnur sekt skal verða givin. Avgerðin hjá starvsnevndini kann verða kærd til dómsnevndina áðrenn 2 dagar. Við kæruni skulu fylgja kr. 2.000, sum verða afturgoldnar, vinnur kæran sømdir. Dómsnevndin hevur endaliga avgerð.

Um lið í 1. ella 2. deild ikki møtir til útidyst í fyrru helvt av kappingini, missir tað sín heimadyst móti sama liði í seinnu helvt av kappingini. Møtir lið ikki til dyst í seinnu helvt, verða báðir dystir roknaðir sum taptir og sum ikki møtt til *báðar* dystir.

**d)** Noktar lið uttan gilduga orsøk at luttaka, verður tað koyrt úr kappingini. Sama hendir um lið rýmir av vølli.

**e)** Lið sum verða koyrd úr kappingini, verða sektað við bót, ið svarar til 2 ferðir luttøkugjaldið fyri liðið. Er sekt ikki goldin innan næsta kappingarár, sleppur felag ikki at luttaka í kapping innan FBF, fyrr enn hon er goldin.

Um lið ikki møtir til dyst til ásettu tíð, verður felagið sektað við bót, svarandi til luttøkugjaldið og tapir dystin 3-0.

**grein 15**

**a)** Tað liðið, sum leikar á heimavølli, skal leggja bólt, sum er góðkendur av FBF, og minst 10 tiltaksbóltar til.

**b)** Heimaliðið hevur ábyrgdina av, at vøllurin er lógliga merktur, at netið er í lagi og kann setast í røttu hædd.

**d)** Dómarin skal vissa sær, at vallarviðurskiftini eru í lagi, áðrenn leikur byrjar.

**e)** Leikvøllurin skal vera góðkendur av FBF.

**grein 16**

**a)** Leikarar á einum liði skulu vera í eins leikbúna.

**b)** Hvør leikbúni skal hava nummar á rygginum, minst 15 cm til hæddar. Hvør leikbúni skal hava nummar á bringuni, minst 10 cm til hæddar.

**d)** Um búnin hevur lýsing, skal hon lúka tær treytir, FBF hevur ásett.

**grein 17**

**a)** Ger felag brot á grein 4, 5, 6, 7, 8, 9, 10, 13, 15 ella 17, kann tað fáa bót og/ella tapa dystin soleiðis, at hitt liðið fær tvey stig fyri dystin, og vinnur hann 3-0 í settmuni og 75-0 í bóltmuni, tó í teimum førum har spælt verður best av 3 settum, verður tað 2-0 í settmuni og 50-0 í bóltmuni.

**grein 18**

**a)** Ber leikari seg so ósømiliga at á vølli, at dómarin má reka hann úr leiki, skal dómarin skrivliga siga kappingarstjóra FBFs frá og somuleiðis viðmerkja hetta á dómaraseðlinum.

**b)** Kappingarstjórinin kann nokta slíkum leikara at luttaka í kapping ásetta tíð.

**d)** Nýtir dómari rætt sín at slíta dystin, skal hann beint aftaná dystin skrivliga greiða kappingarstjóra FBFs frá, hví hann so gjørdi.

**grein 19**

**a)** Heldur liðformaður, at dómari misnýtir vald sítt, skal hann sámuliga mótmæla tí á leikvøllinum. Góðtekur dómarin ikki mótmæli hansara, kann liðformaðurin ella felag hansara senda skrivliga kæru til kappingarstjóra FBFs í seinasta lagi 2 dagar aftan á dystin. Somuleiðis skal hetta viðmerkjast á dómaraseðlinum. Fylgja skulu kr. 500,- við slíkari kæru, sum verða afturgoldnar, um kæran vinnur sømdir, hetta er eisini galdandi fyri allar aðrar klagur.

**grein 20**

**a)** Kærur um avgerðir kappingarstjórans verða at leggja fyri dómsnevndina. Við kæruni skulu fylgja 1.000,- kr., sum verða afturgoldnar, um kæran vinnur sømdir.

**b)** Allar avgerðir dómsnevndarinnar eru endaligar.

**d)** Dómsnevndin kann ikki reka felag ella einstakling úr FBF, slík mál kunnu bert verða løgd fyri aðalfundin ella eykaaðalfundin hjá FBF.

**grein 21**

**a)** Frá tí degi, ið felag hevur sagt frá, at tað luttekur í landskappingini, er tað bundið til at luttaka eftir lógum og reglugerðum FBFs.

**b)** Tó kann kappingarstjóri FBFs eftir áheitan felagsins góðtaka tær orsøkir, ið felagið førir fram, at tað ikki heldur fram við kappingini. Ein slík áheitan má vera nevndini í hendi í minsta lagi 5 dagar, áðrenn dystur felagsins skal fremjast.

**grein 22**

**a)** Reglur fyri steyp, ið givin eru til kappingar millum feløg ella broytingar av slíkum reglum, skulu í seinasta lagi 10 dagar, áðrenn slíkar kappingar verða framdar, verða sendar FBF til góðkenningar.

**b)** FBF kann krevja slíkar reglur broyttar, um hildið verður neyðugt.

**d)** Brýtur felag hesa grein, sleppur tað ikki at luttaka í almennari kapping millum feløg innan FBF, fyrr enn tað lýkur ásettu treytir.

**grein 23**

**a)** Feløg innan FBF kunnu luttaka í almennum flogbóltskappingum ið eru góðkendar av FBF.

**b)** Umsóknir um at hava steypakappingar skal vera FBF í hendi seinast ein mánað áðrenn landskappingin byrjar.

Treytin fyri at fáa eina vaksnamannakapping er, at sama felag skipar fyri einari steypakapping fyri yngri deildir sama kappingarárið.

**d)** Brot á hesa grein verður sektað sum í grein 22.

**grein 24**

Hesar reglur kunnu bert verða broyttar á aðalfundi ella eykaaðalfundi hjá FBF.

**To:** <fbf@fbf.fo>, <magnus.tausen@skulin.fo>, <ruhe@foroya.fo>, <njoensen@post.olivant.fo>, <mariann.oester@skulin.fo>
**Subject:** Kappingarreglur
**CC:** <fridasigmundsdottir@gmail.com>, <gunnva.dam@skulin.fo>
**Date:** Tue, 07 Apr 2009 09:18:45 GMT
**Status:** normal
**From:** Jákup Fjallsbak <jakup.fjallsbak@eik.fo>
**Reply-to:** Jákup Fjallsbak <jakup.fjallsbak@eik.fo>

17

default.htm

Hey FBF

Tað var avtala á seinasta aðalfundi
at eg skuldi skriva uppskot til kappingarreglur hjá teimun yngstu. Tað
havi eg nú gjørt liðugt. Tíverri ikki til novembur sum annars var avtala
á aðalfundinum.

Eg havi eisini umskriva kappingarreglur
fyri tey vaksnu. Tó havi eg ikki gjørt nakað við steypakappingina, tí tað
var samtykt at onnur fólk skuldi arbeiða við at endurskoða steypakappingina.

Eg havi gjørt kappingarreglunar í pørtum.

Ein part fyri landskappingina hjá teimun
vaksnu. Tað eru nøkur støð har tað verður víst til steypakapping, hetta
má møguliga broytast alt eftir hvat hendur við steypakappingini. Eg havi
ikki broytt heiti meistaradeild til Eik liga.

Eg havi sett leikskránni hjá meistaradeildini
hjá kvinnum fyri seg.

Ein part fyri ung sum spæla landskapping.
Hetta er fyri aldursbólkar 14, 16 og unglingar, um tey spæla landskapping.

Ein part fyri børn og ung sum spæla
steypakappingar.

Eg havi ikki skriva nakað um kids volley.
Eg veit ikki nokk um kidsvolley til at skriva reglar um tann partin.

Jákup
KÍF

Leikskrá_hjá_meistaradeild_hjá_kvinnum.doc

# Kappingreglur grein 6. Mál 1

Broytast til at spælarar undir 19, altíð kunna spæla við lægri deild, sjálvt um hann/hon hevur spælt á hægri deild sama vikuskifti. Galdandi alt kappinggarárið.

Hevur verið praktisera av fleiri liðum í ár uttan klagur.

# Kappingarreglur grein 6. Mál 2

Broytast til at spælarar yvir 19, kunnu spæla við lægri deild, um hann/hon ikki verður skift inn á hægri deild, og hevur staðið á dómaraseðilinum. Galdandi alt kappingarárið.

# Steypakappingin. Mál 3

Broytast til eina cup- kapping, har øll lið kunnu vera við. Eftir sama leisti sum í hondbólti

# Eikliga hjá monnum. Mál 4

Broyta landskappingina, so 1 dupultumfar kemur uppí afturat. Kappingin er alt ov stutt. Og spælarar spæla alt ov lítið av dystum

# Eikliga hjá kvinnum. Mál 5

Leingja hana við 1 umfarið, so øll lið vera javnstilla. Leingja kappingina so meira fokus verður á flogbólt

# FM yngri deildir. Mál 6

Heitt verður á FBF um at skipa soleiðis fyri, at FM fyri yngri innleiðandi er síðsta vikuskifti í mars 2010 og at finalurnar (14 og unglingar) eru vikuskiftið aftaná páskir leygardagin 10. apríl 2010.

Ein heitan á FBF. Tá kappingarskipan er gjørd, so set allar tær yngru kappingarnar í eisini. So feløgini betri kunnu planleggja árið

Við flogbóltskvøðu

Janus úr Dímun FLEYR